## Grønlendska rækjuveiðan broytast

Í Grønlandi er rækjukvotan býtt millum tey stóru skipini og tey smærru førini, sum fiska rækjur inni við land, men nú vilja tey smáu førini hava skipanina broytta, tí tey hava næstan onga kvotu eftir. Fiski- og veiðimannafelagið KNAPK hevur vent sær til landsstýrið og vil hava tað at broyta verandi býti, so ein størri partur av kvotuni verður fluttur frá trolarunum til tey snærru førini. Tað kann landsstýrið ikki gera av sínum meintingum, tí í lógini stendur, at kvotupartar kunnu ikki flytast millum veiðibólkarnar.



*Teir smærru rækjubátarnir í Grønlandi skulu hava størri kvotu (Mynd: KNR)*

# Borg partur av XL-Byg

**Fyritøkan Borg, sum er heildarveitari til byggivinnuna, gerst nú partur av stóru og markantu ketuni XL-Byg í Danmark. Hetta metir stjórin, Rodmundur Nielsen, kemur at geva fyritøkuni og viðskiftafólkum hennara nakrar fyrimunir, tí ketan ikki minst hevur felags innkeyp**

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað er nú eitt ár síðan, at navnið Borg fyrstu ferð varð havt á mammamunni, sum felagsnavn fyri gomlu fyritøkurnar Højgaard Handilsvirki í Runavík, Klement Petersen í Saltangará og Klaksvíkar Timburhandil.

Stjórin í felagnum, Rodmundur Nielsen, er væl nøgdur við ta undirtøku, sum nýggja navnið hevur fingið millum manna.

- Sjálvandi er tað ikki bara sum at siga tað at leggja fleiri fyritøkur undir eitt nýtt navn og ein nýggjan samleika, men eg haldi, at hetta við dyggum stuðli frá okkara starvsfólkum og góðari undirtøku frá okkara viðskiftafólkum hevur eydnast væl.

### Borg og XL-Byg

Rodmundur Nielsen sigur, at nú eitt ár er umliðið, kann Borg almannakunngera, at fyritøkan nú eisini verður partur av stóru donsku ketuni, XL-Byg, sum er eitt samstarv um eitt nú innkeyp og marknaðarføring millum einar 140 timburhandlar í Danmark.

- Tað var Balslev, sum hevði hetta samstarv, og aðrir veitarar í Føroyum sluppu tá ikki upp í part. Men tá Balslev-fyritøkan varð seld, helt henda avtala uppat. Vit hava í eina tíð ligið fram við at gerast partur av hesi ketu, og nú er so avtalan komin undir land.

Stjórin sigur, at frá hósdegnum, 16. oktober, byrjar henda avtala í praksis, og tá er øll Borg-fyritøkan prýdd við merkinum hjá XL-Byg.

– Eisini í hesi tilgongdini hava okkara starvsfólk verið fyrimyndarliga virkin, áhugað og positiv. Tey hava lagt rygg og orku til, at hetta skuldi bera til.



*- XL-Byg er eitt av sterkastu nøvnunum innan byggivinnuna í Danmark, og tí er eyðvitað, at nýggja merkið, vit nú kunnu hanga aftrat Borg-navninum, fer at geva bæði okkum og viðskiftafólkunum fyrimunir, sigur stjórin*

### Gevur fyrimunir

Rodmundur sigur, at sum heildarveitari til byggivinnuna fara Borg og viðskiftafólkini hjá handlunum í Runavík, Saltangará og Klaksvík við tíðini at fáa ymiskar fyrimunir við hesum.

- Vit ivast onga løtu í, at tað kemur at síggjast aftur í einum uppafturmeira spennandi og fjølbroyttum vøruútboði, at vit nú gerast partur av eini so stórari handilsketu innan okkara øki.

Hann sigur, at allir handlarnir hjá Borg fáa hetta nýggja XL-Byg merki, sum fer at siga viðskiftafólki, at fyritøkan er við í hesi ketu.

- Felagsinnkeypið fevnir bæði um timbur og vørurnar, sum eru í byggibúðunum, og tá XL-Byg er eitt av sterkastu nøvnunum innan byggivinnuna í Danmark, er eyðvitað, at nýggja merkið, vit nú kunnu hanga aftrat Borg-navninum, fer at geva bæði okkum og viðskiftafólkunum fyrimunir.

Hann vísir á, at tað sjálvandi verður betur fyri Borg-fyritøkuna at standa saman við eini so sterkari ketu heldur enn, at fyritøkan stendur einsamøll.

- Eg ivist heldur onga løtu í, at hetta kemur at gera okkum sjónligari á marknaðinum. XL-Byg, sum er ein "markant" keta, hevur ymisk átøk, sum vit eftir tørvi fara at laga til okkara egnu átøk.

### Ikki stagnera

Stjórin í Borg fegnast um, at fyritøkan nú kann flyta seg eitt fet aftrat fram á leiðini.

- Í sambandi við, at vit nú gerast partur av XL-Byg, bjóða vit børnum og vaksnum í øllum deildum okkara sleikisneisir, ballónir, vaflur og kaffi komandi fríggjadag og leygardag, sigur Rodmundur.

Stjórin í Borg heldur, at fyritøkan hetta seinasta árið hevur flutt seg rætta vegin, sum hann tekur til, og við XL-Byg verður so næsta stigið tikið.

- Skalt tú standa teg í kappingini, er neyðugt, at fyritøkan mennist alla tíðina, og nýggjasta stigið hjá okkum er avgjørt eitt týdningarmikið stig á leiðini, sigur Rodmundur Nielsen.




*- Skalt tú standa teg í kappingini, er neyðugt, at fyritøkan mennist alla tíðina, og nýggjasta stigið hjá okkum er avgjørt eitt týdningarmikið stig á leiðini, sigur Rodmundur Nielsen, stjóri í Borg-fyritøkuni – við XL-Byg merkinum á blusuni*

## FAKTA

Hin 21. september 2007 vórðu allar tríggjar fyritøkurnar, Højgaards Handilsvirki, Klement Petersen og Timburhandilin í Klaksvík, savnaðar undir einum navni, Borg.

Hetta er gjørt fyri, at fyritøkan skal hava eitt felags andlit úteftir og fyri at savna alt virksemi í sama felag.

Tað er P/F KN, sum eigur P/F Borg, og eigarar av hesum felag eru Jónsvein Knudsen, Rodmundur Nielsen og Jóhannus Danielsen.

Í oktober 2005 yvirtók P/F KN partabrøvini í P/F Højgaards Handilsvirki.

Í mai 2006 keypti felagið Timburhandilin í Klaksvík og P/F Klement Petersen í Saltangará.

Fyritøkan Borg er í dag eitt handilsvirki við deildum í Runavík, Saltangará og Klaksvík.